gult22 cyan22 magenta22 svart22



B36 – LÍF 5-3 (2-1):

# B36 er við aftur

**Við sigrinum á LÍF er B36 við aftur í oddastríðnum, hóast liðið enn er trý stig aftanfyri fremsta liðið. Sigurin hjá B36 var uppiborin, tí heimaliðið spældi seg fram til fleiri møguleikar og hevði bóltin meira**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Eftir eina góða byrjan uppá kappingarárið er liðið hjá leirvíkingum dottið niður á næstniðasta plássið, og teir liggja í løtuni til at spæla upp- og niðurflytingardyst móti næstfremsta 3. deildarliðnum. B36 heldur hinvegin fast í oddaliðunum og hevur góðan møguleika at vinna heiðursmerki í ár.

Eingin ivi var um, at B36 var betra liðið í dystinum móti LÍF leygardagin. B36 skapti fleiri málmøguleikar og hevði greiða yvirvág í leiki størsta partin av dystinum.

Tað var annars LÍF, sum fekk fyrsta málið. Tann ungi framherjin Magnus



*LÍF var við undirlutan í Gundadali, og eftir eina góða byrjan á kappingarárið, er botnurin nú av álvara farin at nærkast hjá teimum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skoralíð, varð spældur leysur, og hann sendi spakuliga framvið málverjanum hjá B36, sum var komin út ímóti.

B36 hevði annars havt meira spæl undan málinum, og tí mundi tað koma sum ein hvøkkur fyri heimaliðið. B36 megnaði tó at leggja seg framum, áðrenn hálvleik. Fyrst var tað Brynleif Hansen, sum gjørdist leysur og langaði til úr spískum upp undir nettakið. Síðani skoraði Áki Mørk til 2-1 stutt fyri steðgin.

## 2. hálvleikur málríkur

Tá dómarin bríkslaði í gongd, setti B36 ferðina upp, og tað eydnaðist at leggja seg framum 4-1, áðrenn LÍF raknaði við aftur.

Liðformaðurin Karl Leonsson økti um leiðsluna til 3-1, tá hann setti fótin á bóltin inni í málteiginum, og Áki Mørk var aftur á blettinum løtu seinni. So tóktist sum um dysturin var liðugur.

LÍF gjørdi tó ein vørr afturat. Dómarin bríkslaði fyri einum heldur ivasomum brotssparki, sum Tomek Resel setti inn, og sami Resel sendi síðani eitt fríspark beinleiðis í netið. Millum málini hjá Resel hevði Rógvi Róin skotið eitt mál í hinum endanum.

Samanumtikið var tað ein uppiborin sigur til havnarmenn, sum enn eru við í stríðnum um oddasessin. LÍF er hinvegin í botninum av stigatalvuni, har GÍ er aftast. Ein sera týdningarmikil dystur verður komandi leygardag, tá botnliðini hittast í Gøtu.

**B36 – LÍF 5-3 (2-1)**
0-1: Magnus Skoralíð
1-1: Brynleif Hansen
2-1: Áki Mørk
3-1: Karl Leonsson
4-1: Áki Mørk
4-2: Tomek Resel (br.)
5-2: Rógvi Róin
5-3: Tomek Resel

# Tungt hjá fuglfirðingum

**Enn mugu forhondsfavorittarnir úr ÍF hyggja langt upp á talvuni, skulu teir síggja oddaliðini**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Vit eru framvegis frammanfyri ÍF. Hetta staðfestu NSÍ menninir, tá teir fóru av vøllinum í Fuglafirði, har teir høvdu tapt 2–0. Stigatalvan sigur, at hetta er satt, og tað sigur eisini, at fótbólturin í Runavík hevur tað nógv betri, enn fótbólturin í Fuglafirði hevur tað.

Næstbestu NSÍ menninir høvdu nógvar royndir. Trygvi Mortensen var ein brandur í málinum (millum annað bjargaði hann í 2. hálvleiki brotssparki), og frammanfyri seg hevði hann millum aðrar brøðurnar Eyðun og Oddfríða Gaardbo og longri frammi á vøllinum Sverra Justinussen.

NSÍ hevði ikki nógvar upplagdar møguleikar, men tá heimaliðið hevði ilt við at koma avgerandi framum, so var spenningur alla tíðina um, um NSÍ álopið eina ferð skuldi megna at sleppa frá Torsteini Joensen og teimum í ÍF verjuni og fáa bóltin innum Ken Bærentsen.

ÍF vann 2–0, men tað var ikki fyrrenn tað restaði ein lítil løta, at teir skoraðu seinna málið. Eyðálvur R. Petersen misnýtti bortssparkið, sum ÍF fekk, tá ein NSÍ maður púra ómotiverað tók bóltin eftir hornaspark og tískil fekk reyða kortið.

Eyðálvur R. Petersen skoraði til 2–0 við fínum skoti úr 16 metrum og eitt sindur til høgru. Trygvi Mortensen fekk ytsta lið á fingrinum á, men bólturin fór umvegis handara stólpan og í netið.

Í 1. hálvleiki hevði Jan Jørgensen skorað til 1–0, eftir at bólturin var stungin fram ímillum. Jan Jørgensen vaks upp í NSÍ. Síðst í áttati árunum var hann evnaríkur ungur spælari. Níti árini hevur hann verið á flatlondum. Nú er hann aftur í Føroyum, og hóast fótbóltsaldurin er høgur, so er hann kærkomin styrkur hjá ÍF.

Fuglfirðingar høvdu í 2. hálvleiki nógvar hálvar møguleikar, men teir vóru lítið neyvir.

**2. deild ÍF–NSÍ 2–0 (1–0)**
1–0: Jan Jørgensen

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 9 | 5 - 2 - 2 | 20 | 16 | 4 | 17 |
| 2 | Skála | 9 | 4 - 4 - 1 | 18 | 10 | 8 | 16 |
| 3 | NSÍ | 9 | 5 - 0 - 4 | 18 | 19 | -1 | 15 |
| 4 | B36 | 9 | 4 - 2 - 3 | 20 | 20 | 0 | 14 |
| 5 | Sumba | 9 | 4 - 1 - 4 | 24 | 18 | 6 | 13 |
| 6 | ÍF | 9 | 4 - 1 - 4 | 22 | 17 | 5 | 13 |
| 7 | TB | 9 | 3 - 3 - 3 | 19 | 20 | -1 | 12 |
| 8 | KÍ | 9 | 3 - 3 - 3 | 12 | 13 | -1 | 12 |
| 9 | LÍF | 9 | 2 - 2 - 5 | 16 | 21 | -5 | 8 |
| 10 | GÍ | 9 | 1 - 2 - 6 | 10 | 25 | -15 | 5 |

**Máltindurin:**

| | | |
|---|---|---|
| Eyðun Samuelsen | HB | 7 |
| Jan Jørgensen | ÍF | 7 |
| Tomek Resel | LÍF | 7 |
| Bogi Gregersen | Skála | 7 |
| Áki Mørk | B36 | 5 |
| Heini í Skorini | B36 | 5 |
| Fróði Jóanesarson | NSÍ | 5 |
| Eirikur Joensen | Sumba | 5 |
| Nebojsa Velkovic | Sumba | 5 |
| Gunnar Mohr | HB | 4 |
| Jonhard Høgnesen | LÍF | 4 |
| Jan Nónklett | NSÍ | 4 |
| Pauli Hansen | Skála | 4 |
| Zoran Mancic | TB | 4 |

# Skála misti

**Við málleysa javnleikinum í Klaksvík mistu Skálamenn oddasessin, sum teir hava havt higartil í landskappingini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Skálamenn vóru komnir norður eftir sigrinum, tá teir vitjaðu í Klaksvik um vikuskiftið. Tá teir fóru á vøllin, høvdu teir framvegis fremsta plássið í varveitslu, men eftir 90 minuttir uttan mál, máttu teir ásanna, at teir fyri fyrstu ferð í ár ikki vóru á odda.

Javnleikur var kanska eisini eitt hóskandi úrslit, tó at bæði liðini høvdu møguleikar til at gera okkurt málið.

Fyrra hálvleik var tað kanska heimaliðið, sum hevði eina lítla yvirvág, men tað var kortini so sum so við møguleikunum. Eitt fríspark frá Eyðuni Klakstein á stongina var hitt nærmasta. Hinvegin var Skála vandamikið í skjótum mótálopum, og eftir eitt slíkt fekk Marius Joensen gyltan møguleika, men Carsten Joensen í KÍ málinum kom sera væl út og bjargaði.

Í seinna hálvleiki vendi gongdin. Nú vóru tað gestirnir, sum trýstu, men mál komu tó ikki. Ofta fingu teir spælt seg fram í sjálvan brotsteigin, men tað var kortini sjáldan, at talan gjørdist um veruligar atsóknir. Alexandur Johansen skeyt ta einu ferðina á yvirleggjaran, men hinvegin noyddust skálamenn sjálvir at bjarga á strikuni, tá Olgar Danielsen stútaði eftir horna.

Alt í eitt rættvíst úrslit, hóast hvørgin parturin sum so man vera serliga væl nøgdur um einsamalla stigið.

**KÍ-Skála 0-0**

gult23 cyan23 magenta23 svart23



Jazzfestivalurin juli 2001:

# Sjónleikarhúsið bjóðar jazz-, popp-, gospel-, og fólkatónleik

**JAZZFESTIVALUR**
**3. til 8. juli, 2001**

Sjónleikarhúsið hevur fyrr verið nýtt til tónleik, s. s. Goggudans, konsertir við Hjarnum, Faroe Boys, og MC-Hár, og nógvan annað tónleikaligt. So tað var rættiliga innlýsandi, at húsið hjá Sjónleikarfelagnum fór at hýsa ein part av ársins Jazz-, Fólka- og Blues Festivali.

Tiltøkini í Sjónleikarhúsinum verða hósdagin 5. juli og fríggjadagin 6. juli. Frá klokkan 20.00 til 22.00. Og talan er fyri tað mesta um gospel-, jazz-, popp-, og fólkatónleik.

Hóskvøldið er tað stóra kórkvøldið. Tíggjutals sangarar og tónleikarar úr Føroyum trína pallin til kórsang, ið bæði umfatar barnaløg, lovsang og popp. Nøvnini eru »Ung Stjørnuskot« og »Praise«.



## Ung Stjørnuskot

Ung Stjørnuskot eru fyrst og fremst 30 sangarar, sum venja í Skansastovu. 11 av teimum 30 eru dreingir. Og lærari teirra er Sigrið Sivertsen.

Tey 30 Ungu Stjørnuskotini syngja av og á sum eitt kór. Men oftast framføra tey í smáum bólkum. Sigrið Sivertsen hevur vant tey í bólkum við 4. Og tað stóra kórið er komið seinni. Tey 10-14 ára gomlu fara at syngja so kend løg sum The Rose, I Believe I Can Fly, My Heart Will Go On, og Dukkan Fía. Og okkurt lag hjá Britney Spears er eisini á skránni.

Sagt verður, at av teimum 30 eru fleiri stórtalent, sum hava góðan møguleika at røkka langt, um tey leggja í.

Ung Stjørnuskot hoyra til ein undirvísingarbólk, sum Sigrið Sivertsen hevur vant í tvey ár.

Fyri at menna sín førleika, hevur hon tikið nógv skeið í sangi á Rútmiska Konservatoriinum í Keypmannahavn. Og Sigrið vónar, at tey ungu hava fingið gagn av hesum.

Men sangararnir eru ikki einsamallir. Saman við sær hava teir tónleikarar frá Musikkskúlaskipanini. Ymsir ungir tónleikarar spæla undir hjá Ungu Stjørnuskotunum, alt eftir hvør sangur, ella lag verður sungið.

Mest er tað gittarlærarin, Bo Isholm, sum hevur vant tónleikararnar. Men eisini undirvísarar, sum Jónleif Jensen, hava havt ein fingur við í spælinum.

Festivalfyrireikarin, Brandur Øssursson, hoyrdi Ungu Stjørnuskotini, tá musikkskúladagar vóru í januar. Hann gjørdist hugtikin og bjóðaði teimum við.

## Praise

Praise er ein rútmiskur gospelbólkur úr Danmark, sum er í Sjónleikahúsinum sama kvøld sum Ung Stjørnuskot.

Ongin sangari ella tónleikari í Praise hevur fyrr vitjað í Føroyum. Men vit hava frætt frá einum føroyingi, sum hevur hoyrt Praise. Viðkomandi sigur, at tónleikurin er væl spældur, svingar væl. Og songkvinnan, ið syngur fyri, hevur eina avbera vakra og mjúka rødd.

Hon er ivaleyst dugnalig, tí seinastu árini hevur hon sungið nógv saman við Ettu Cameron. Og Etta er ikki hvør sum helst í gospelhøpi.

## Blandað fríggjakvøld

Seinna kvøldið í Sjónleikarhúsinum verður ymsur tónleikur spældur. Føroyingar og danskarar spæla jazz. Og íslendingur, álendingur, og grønlendingur framføra fólkatónleik. Nøvnini eru Debazz Trio, Ulf Fleischer, KK (Krístján Kristjánsson), Enqvist og Pensar.

## Debazz Trio

Debazz var eitt jazzprosjekt og fløguútgáva hjá Edvard Nyholm Debes. Í samband við Jazzfestivalin skipar E.N.D. tað sum ein konsertbólk, Debazz Trio, við so góðum kreftum sum saxofonistinum Karsten Vogel, sær sjálvum, og klaverspælaranum Niels Thybo.

Edvard sigur, at Nielse Thybo var ein tann fyrst danski pianisturin, sum bergtók hann. Og hesin er eisini heimskendur í Danmark.

Karsten Vogel er bæði góður og nógv virdur, so E.N.D. heldur, at tað næstan ikki kann vera betur.

Debazz Trio fer at spæla tónleik burtur úr fløguni. Ilt er at seta navn á stílin. Okkurt lag er rættiliga konservativur jazzur. Annað meira eksperimenterandi. Og so flirtar E.N.D. eisini við poppi hjá Rolling Stones, sum tó er rættiliga nógv umarrangeraður.

Edvard Nyholm Debes hevur júst verið í Danmark og vant saman við Karsten Vogel og Niels Thybo. Hann sigur, at teir svingaðu stak væl saman.

## Ulf Fleischer

Ulf Fleischer er grønlendskur trubadurur. Konsertfyrireikarar í Danmark mæltu til at bjóða Ulf Fleischer á Tórhsavnar Jazz- Fólka- og Blues Festival. Ja, tað er kanska eitt gott hugskot. Oftast er tað soleiðis, at Ramsus Lyberth kemur hendanvegin, tá vit ynskja at hoyra grønlendskan vísusang.

Onki ringt um Lyberth, men nú fáa vit so møguleikan at gerast kend við okkurt, sum er øðrvísi.

Vit eiga at fyrireika okkum til eina inniliga og nógv sigandi løtu saman við Ulf Fleischer. Sangurin og gittarin tala.

Ulf Fleischer hevur gjørt fleiri fløgur við grønlendskum vísusangi.

## Enqvist/Pensar

Seinna kvøldið í Sjónleikarhúsinum hoyra vit eisini vísusang og fólkatónleik eystanífrá.

Tveir menn úr Álandi koma sum duett. Tað eru sangarin og gittarspælarin, Bengt Enqvist, og gittarspælarin, Kjell Pensar.

Bengt Enqvist sigur um seg sjálvan:

– »Eg syngi og spæli meg sjálvan. Og eg havi ein stóra og fjøltáttaða skrá.

M.a.skemtiligar vísur. Men eisini rættiliga klassiskan fólkatónleik, s.s. Taube, Ferlin, Ruben Nilsson, o.a.

Eg syngi eisini nógvar álendskar vísur, t.d. eina Georg Kåhre skrá«.

Bengt Enqvist leggur aftrat, at hann syngur og spælir nógv alment í Álandi, Finnlandi og Svøríki.

Hin maðurin í duettini er Kjell Pensar. Hann er 51 ára gamal, og lýsir seg sjálvan soleiðis:

– »Eg byrjaði at spæla gittar sum tannáringur. Men ongantíð havi eg spælt so nógv sum nú, bæði í Caféum, skúlum, og í studio. Eg havi nevniliga hjálpt Bengt Enqvist við nýggju fløguni, »Sången om Jorden«. Mær dámar væl tónleik við sigandi tekstum, eitt nú blues. Og eg eri ein sannur norðbúgvi, sum er fegin um norðurlendska samstarvið«.

# Børn til Estlands á sjónleikaralegu

TÍÐINDASKRIV
*Meginfelag áhugaleikara Føroya*

8.-23. juli í ár fara 10 føroysk børn millum 12 og 14 ár við 2 vaksnum til Viljandi í Estlandi á sjónleikaralegu. Børn úr 20 londum vera við og tey fara at arbeiða við sjónleiki so gott sum hvønn dag meðan tey eru har. Hetta verður stuttligt, strævi og spennandi hjá børnunum. Tað er Meginfelag áhugaleikara Føroya (MáF), sum hevur fingið innbjóðing til tiltakið, ið nevnist EDERED. MáF tekur sær av tí praktiska áðrenn farið verður avstað. EDERED verður fyriskipað triðja hvørt ár og hetta er fyrstu ferð Føroyar sendir ein bólk avstað. Vanliga hava danir verið so beinasamir at bjóða tveimum føroyingum við teirra bólki. Orsøkin er tann at í 1999 gjørdist MáF limur í altjóða áhugaleikarafelagskapinum IATA og tað eru bert limir í IATA, sum verða boðnir við.

Eyð Matras og Sonja Schneider eru ferðaleiðarar. Eyð skal vera lærari á eini sokallaðari work-shop, meðan Sonja skal vera sum ein mamma fyri børnini á túrinum.

Í innbjóðingini løgdu fyrireikararnir stóran dent á at børnini ikki eru úr sama stað og at tað ikki er ein samansjóðaður bólkur, har øll kennast. Børnini skulu vera 12-15 ára gomul, hvørki eldri ella yngri og í bólkinum skulu vera 5 gentir og 5 dreingir. Luttakararnir úr Føroyum eru: Vølundur Lognberg, Rósa Egholm, Bogi Krossteig og Rakul Thomsen úr Havn, Bergur F. Mikladal, Bárður F. Mikladal og Hallgerð B. Joensen úr Klaksvík, Ulla Poulsen, Villy Joensen og Jacoba Jacobsen úr Nólsoy.

Tá MáF sendir fólk uttanlanda til eitthvørt sjónleikatiltak, verður dentur lagdur á, at øll skulu hava sama møguleika at fara. Tvs. at um tað verður ov dýrt, setast nøkur aftur. Tí stuðlar MáF tiltakinum fíggjarliga umframt at søkt verður eftir stuðli aðrastaðni. Sostatt hava eisini hesi stuðlað børnunum at sleppa avstað: Leikpallur Føroya, Nordisk Amatørteaterråd, Norðoya Sparikassi, Nólsoyar Kommuna, Tórshavnar Kommuna og Klaksvíkar Kommuna.

MáF hevur heitt á børnini um at gera eina dagbók frá ferðini. Hon verður so ætlandi send til fjølmiðlarnar eftir túrin.